# – Tit hava eitt vakurt land




– Føroyar er vakurt land, sigur Samuel Oskarsson (uttast høgrumegin), sum her er avmyndaður saman við ferðafelagum sínum

**Seinastu ferðafólkini á camping-plássinum Yviri við Strond fóru heimaftur við Norrönu í gjár**

GISTING
*Orð & mynd: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Yviri við Strond:** – Tit hava eitt ótrúliga vakurt land, staðfestir íslendingurin Samuel Óskarsson,

Hann er ættaður úr Reykjavík og hevur seinastu dagarnar verið á vitjan í Føroyum saman við konu síni, systir hennara og manni.

– Vit hava ferðast víða um landið, og hava sæð og upplivað nógv, sigur Samuel.

Hetta er fyrsta ferðin tey eru og vitja í Føroyum. Tað kundi meiri enn so hent at tey komu aftur.

Gjáramorgunin fóru tey sum tey seinastu ferðafólkini í summar av camping-plássinum Yviri við Strond.

## Sama veðrið

Tey fýra komu við Norrönu í farnu viku, og tá hon legði frá landi aftur í gjár fóru tey heimaftur til Íslands.

– Vit komu higar fyri at skoða landið, sigur fryntligi reykjavíkingurin.

Við húsvogni teirra hava tey ferðast runt ein stóran part av landinum.

Tey hava verið í Havn, Bø, Tjørnuvík, Eiði og Klaksvík, bert fyri at nevna nøkur støð.

Men í Gásadali vóru tey ikki!

– Har stóð eitt skelti, sum segði at tað var undir egnari ábyrgd at koyra hagar. Og tí fóru vit ikki gjøgnum tunnilin til bygdina, greiðir Samuel frá.

Veðrið hevur verið heldur misjavnt um vikuskiftið, men tað hava tey ikki lagt nakað í.

– Tað er ikki so nógv øðrvísi enn heima á Íslandi, sigur Samuel.

# Ferðafólkini koma aftur og aftur

**– Vit hava so ikki fingið nakrar klagur frá teimum ferðandi um umstøðurnar á camping-plássinum. Tað er í øllum førum í lagi, sigur Ingigerð á Trøðni**

FERÐAVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*




*Campingplássið har Yviri við Strond verður nógv brúkt av ferðafólkum. Tey koma aftur og aftur*

**Gisting:** – Tey eru í øllum førum væl nøgd við umstøðurnar á camping-plássinum har Yviri við Strond, sigur hon

Ingigerð er leiðari á Kunningarstovuni í Havn, og hevur sum ein part av virksemi sínum eisini ábyrgdina fyri camping-plássinum í Havn.

Har hava nógv fólk gist millum ár og dag síðani tað lat upp fyri rættiliga nógvum árum síðani. Ingigerð sjálv hevur so bara fingið góðar afturmeldingar frá fólki.

– Tað vísir seg at fólkini tey koma aftur og aftur, sigur hon.

Hetta sigur hon sum viðmerking til tað, sum Richard Grimsdale segði í blaðnum um gjár um støðið á føroysku camping-plássunum.

Eftir hansara meting var støðið als ikki nøktandi til limirnar í hansara ferðafelagi.

– Eftir at hava hugt meg um her, kann eg bara staðfesta, at tey føroysku campingplássini eru ikki nóg góð til okkara kundar.

–Tíverri, má eg bara siga, segði hann við Sosialin í gjár.

## Pástandir

Mr. Grimsdale er ferðastjóri í einum ferðavinnufelagi fyri campingbilar og húsvognar í Bretlandi við omanfyri 400.000 limum.

Hesum fólkum dáma væl at ferðast kring allan knøttin, bæði eystureftir, til sandin í Sahara og til Norðkapp.

Hann var nú komin til Føroyar at kanna umstøðurnar her. Men sum hann sjálvur segði í Sosialinum í gjár, so vóru tær als ikki nøktandi.

Í samrøðuni vísti hann á, at hann vildi fegin vísa limum sínum á Føroyar sum ferðamál, tí her er so nógv at síggja og uppliva hjá limum hansara.

Men tað var kortini eitt sum kundi forða hesum:

Tá talan er um gisting við camping-bilum og húsvognum, vildi hann líkasum ikki taka ábyrgd fyri tí. Hetta máttu fólkini sjálvi syrgja fyri.

Hetta seinasta tykist vera heldur herskin biti hjá mongum, og onkur hevur tí longu gjørt vart við seg mótvegis blaðnum, at slíkar útsagnir eru bæði ósakligar og grundleysar.

– Hví steðgar maðurin ikki á og tosar við okkum um málið? Eg skilji einki av hesum, tí okkara pláss eru nóg góð!

– Hann sleingir bert nakað út, uttan at vit hava møguleika fyri at koma við okkara viðmerkingum, varð sagt.

## Tænastan í lagi

Støðið á føroysku camping-plássunum er altíð eitt mál, sum ein kann tjakast um.

Tað veldst um krøvini, ið sett verða.

Ingigerð veit sjálv um camping-pláss í Onglandi sum eru nógv verri enn okkara. Men her hjá okkum tykist tað sum um tey ferðandi eru nøgd við umstøðurnar.

– Tað, tey serliga seta prís uppá her hjá okkum er,at tey eru nær við høvuðsstaðin, og tað at okkara camping-pláss liggur beint við sjógvin.

– Hetta eru tey eftir øllum at døma nøgd við, og tí koma tey aftur og aftur, sigur Ingigerð.

Har Yviri við Strond er plássið útgjørt við m.a. toilettum, brúsum, køki og rúmi at turka klæðir í. Har er eisini møguleiki hjá teimum gistandi at fáa fatur á el-veiting til íalt 18 eindir.

Sum skilst er ætlanin at fáa fleiri el-veitingar og helst eisini eina turkitrumlu til vega. Hetta fer sum rímiligt er at hækka um støðið.

> *Tað, sum ferðafólkini serliga seta prís uppá her hjá okkum er,at tey eru nær við høvuðsstaðin, og tað at okkara camping-pláss liggur beint viðsjógvin*